FISKIMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Postboks 208
110 Tórshavn

**Stjórnarskrivstovan**
18. november 2013
Mál: 13/00856-2
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 17/2013

**Fyrispurningur um royndarloyvi á Føroya Banka við ymiskum fiskireiðskapi, settur Jacob Vestergaard, landsstýrismanni (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

**Kári P. Højgaard, løgtingsmaður**

1. Kann landsstýrismaðurin upplýsa vektarseðlarnar frá royndarveiðuni eftir havtasku við gørnum á Føroya Banka 1999?
2. Kann landsstýrismaðurin upplýsa teir 4 vektarseðlarnar frá tí eina útróðrarbátinum, sum í 2013 hevur verið úti á Bankanum 4 royndartúrar. Ein í januar, ein í mai, ein í juni og ein í september?
3. Hvussu nógvir húkar eru drignir á hvørjum túri?
4. Er møguleiki fyri at "undirfiska" fiskastovnar við tí fylgju, at hesir hava neiliga ávirkan á aðrar fiskastovnar (t.d. havtaska etur tosk og hýsu)?
5. Um royndarveiða eftir havtasku við gørnum var til ampa fyri línuveiðu og av hesi orsøk bleiv steðgað. Hvørjar eru grundgevingarnar hjá landsstýrismanninum og Havstovuni fyri, at ongar royndir við gørnum eru framdar í 14 ár?

**Svar:**

**Til nr. 1.**
Garnaskipið "Nim" royndarfiskaði við havtaskugørnum á Føroya Banka í 1999. Roynt varð á leiðum, har dýpið var umleið 150 metrar, t.v.s. eisini á tí partinum av Bankanum, sum nú er friðaður m.a. fyri gørnum. Veiðinøgdirnar í tíðarskeiðinum 13-06-1999 til 12-09-1999 eru vístar í talvuni niðanfyri (sí annars hjálagt skjal):

**Veiðan í royndunum við havtaskugørnum á Føroya Banka 13-06-1999 til 12-09-1999, kg og %-býtið**

| | kg | %-býtið |
|---|---|---|
| Havtaska | 108.600 | 86,44% |
| Toskur | 3.480 | 2,77% |
| Upsi | 540 | 0,43% |
| Kalvi | 2.580 | 2,05% |
| Skøta | 9.840 | 7,83% |
| Annað | 600 | 0,48% |
| Tilsamans | 125.640 | 100,00% |

Upplýst er ikki, hvussu nógv gørn eru sett í hvørjari setu. Men skipið var ein túr seinni á árinum (21.-25. oktober). Skrásetingarnar tá vístu m.a., at veiðan var at kalla bara havtaska (98,3 %), og fyri hvørt garnið fingu teir 7,41 kg.

**Til nr. 2.**
Hjálagt er yvirlit yvir veiðuna fyri hvønn túr hjá útróðrarbátinum, sum í 2013 gjørdi royndir fyri Havstovuna eftir skøtu við ymiskum húkastøddum á Føroya Banka.

**Til nr. 3.**
Í royndunum eftir skøtu á Føroya Banka, sum ein útróðrarbátur hevur gjørt í 2013 í samstarvi við Havstovuna, vórðu royndir gjørdar við smáum húkum og við stórum húkum (kalvahúkum). Báturin hevur verið fýra túrar. Fyrsta túrin vórðu 3.300 stórir húkar og 355 smáir húkar drignir, annan og triðja túrin 4.800 stórir húkar og 570 smáir húkar, og fjórða túrin vórðu drignir 6.400 stórir húkar og 760 smáir húkar.

**Til nr. 4.**
Tað er torført at svara spurninginum, um møguleiki er fyri at "undirfiska" fiskastovnar við tí fylgju, at hesir hava neiliga ávirkan á aðrar fiskastovnar, t.d. at havtaska etur tosk og hýsu. Eitt nú tí, at fiskiveiða er bara ein av nógvum faktorum, sum beinleiðis og óbeinleiðis hevur ávirkan á vistskipanina, og hvussu ymisku fiskastovnarnir eru fyri.

Spurningurin leggur upp til at loyva beinleiðis veiðu eftir havtasku á Føroya Banka, soleiðis at stovnarnir av toski/hýsu kunnu koma fyri seg aftur, tí átið frá havtasku minkar. Í hesum sambandi er týdningarmikið at vita, hvussu nógv er til av toski og havtasku á Føroya Banka. Ein stovnsmeting av havtasku við Føroyar vísir, at havtaskustovnurin sveiggjaði millum 9 og 19 túsund tons í tíðarskeiðinum frá 1999 til 2011, og var stovnurin umleið 11 túsund tons í 2011. Hetta er fyri landgrunnin og Føroya Banka tilsamans. Havstovan metir, at nøgdin av havtasku á Føroya Banka var góð 1000 tons í 2011, og er minkað nakað síðani. Nøgdirnar av toski eru størri, frá 2000 til 10.000 tons.

Kanningar vísa, at havtaska og toskur eta umleið líka ofta tosk, umleið ein tosk fyri hvørjar 50 ella 60 kannaðar magar. Havtaska kann eta umleið 12 % (í vekt) av toskastovninum á landgrunninum um árið (2001-2005). Toskur á landgrunninum etur somikið nógvan smáfisk, at tað hevur neiliga ávirkan á tilgongdina av smáfiski á landgrunninum. Ikki er greitt, hvussu nógvan smáfisk toskur etur á Føroya Banka, men tað er neyvan minni enn á

landgrunninum. Við tað, at tað er meira av toski enn av havtasku á Føroya Banka, metir Havstovan, at toskur hevur størri neiliga ávirkan á tosk á Føroya Banka enn havtaska.

Samanumtikið kann ein siga, at tað eisini eru onnur ting í vistskipanini enn viðurskiftini millum havtasku og tosk, sum hava týdning fyri tilgongd hjá toski og hýsu. Og tí er tað torført at siga, um møguleiki er fyri at "undirfiska" fiskastovnar við tí fylgju, at hesir hava neiliga ávirkan á aðrar fiskastovnar, t.d. at havtaska etur tosk og hýsu

**Til nr. 5.**
Fyrst er at siga, at eftir lógini um vinnuligan fiskiskap (§ 20) eru tvey sløg av royndarfiskiskapi. 1) Havstovan hevur loyvið at fremja vísindaligar fiskirannsóknir við egnum ella leigaðum fiskiførum. 2) Landsstýrismaðurin kann lata serstakt loyvi til royndarfiskiskap. (sí nærri á www.fisk.fo, undir "Royndarfiskiskapur").

Sum víst var á í svarinum til § 52a-fyrispurning nr. 13/2013, eru grundgevingarnar fyri, at royndarloyvið til havtaskugørn á Føroya Banka ikki eru latin eftir § 20, stk. 2 í lógini um vinnuligan fiskiskap síðani 1999, at Havstovan hevur mælt frá og/ella tí, at landsstýrismaðurin hevur gjørt av ikki at lata royndarloyvi til fiskiskap við gørnum á Føroya Banka.

Ein av høvuðsgrundunum til, at royndirnar við havtaskugørnum á Bankanum ikki vórðu tiknar upp aftur árini eftir 1999 var, at tað vísti seg, at royndirnar vóru til ampa fyri veiðu við línu. Her kann leggjast afturat, at í allar flestu royndarloyvum, sum verða latin við heimild í § 20, stk. 2, er ein standardtreyt, at royndarfiskiskapur ikki skal vera øðrum fiskiskapi til ampa, og skal um neyðugt víkja.

Havstovan upplýsir, at orsøkin til, at tey ikki hava gjørt royndir við gørnum á Føroya Banka er, at arbeiðsorkan er avmarkað. Hinvegin hevur Havstovan, við fíggjarligum stuðli frá Granskingarráðnum og Fiskivinnuroyndum, gjørt nógv við at kanna havtasku á føroyska landgrunninum í sambandi við eina PhD-verkætlan, m.a. royndir við gørnum. Lagt kann vera afturat, at eitt av endamálunum við royndarfiskiskapi er at útvega nýggja vitan um t.d. fisk, fiskastovnar og veiðihættir. Í sambandi við havtasku á Føroya Banka hevur Havstovan mett seg at hava nóg mikið av vitan til at kunna siga nakað um nøgdina av havtasku á Bankanum.

+ skjøl.

**Jacob Vestergaard**
*landsstýrismaður*

# SKJØL

## Úr veiðidagbók hjá "Nim" í royndum við havtaskugørnum á Føroya Banka frá 13/6-1999 til 12/9-1999. Kassar á uml. 60 kg

| Nr. | Dato | Tosk | Hýsa | Upsi | Kalvi | Havtaska | Skøta | Hvasskvoysa | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 19990613 | 1 | | | | 2 | | | 3 |
| 2 | 19990613 | 2 | | | | 6 | | | 8 |
| 3 | 19990613 | | | | | 3 | | | 3 |
| 4 | 19990614 | 1 | | | | 5 | | | 6 |
| 5 | 19990614 | | | | | 3 | | | 3 |
| 6 | 19990614 | 1 | | | | 3 | | | 4 |
| 7 | 19990618 | 2 | | | | 1 | | | 3 |
| 8 | 19990618 | | | | | 3 | | | 3 |
| 9 | 19990618 | 1 | | | | 2 | | | 3 |
| 10 | 19990619 | | | | | 6 | 4 | | 10 |
| 11 | 19990619 | | | | | 10 | 2 | | 12 |
| 12 | 19990622 | | | | | 6 | 3 | | 9 |
| 13 | 19990622 | 2 | | | 1 | 14 | 1 | | 18 |
| 14 | 19990622 | 3 | | | 1 | 15 | 5 | | 24 |
| 15 | 19990622 | 3 | | 1 | 1 | 16 | 1 | | 22 |
| 16 | 19990622 | 1 | | | 1 | 13 | | 1 | 17 |
| 17 | 19990629 | | | | 1 | 9 | | | 10 |
| 18 | 19990629 | | | | 1 | 4 | 2 | | 8 |
| 19 | 19990629 | | | | 1 | 11 | 2 | 1 | 16 |
| 20 | 19990629 | | | | | 11 | 1 | | 14 |
| 21 | 19990630 | | | | | 6 | | | 6 |
| 22 | 19990630 | | | | | 7 | | | 8 |
| 23 | 19990630 | | | | 1 | 7 | 1 | | 9 |
| 24 | 19990704 | | | | | 4 | 19 | | 23 |
| 25 | 19990704 | | | | 1 | 3 | 23 | | 27 |
| 26 | 19990704 | 1 | | | 3 | 9 | | | 13 |
| 27 | 19990704 | | | | | 8 | | | 8 |
| 28 | 19990704 | 1 | | | | 6 | | | 7 |
| 29 | 19990705 | | | | | 5 | | | 5 |
| 30 | 19990705 | 1 | | | | 11 | | | 12 |
| 31 | 19990711 | 1 | | | | 5 | 10 | | 16 |
| 32 | 19990711 | | | | | 8 | 10 | | 18 |
| 33 | 19990711 | 1 | | | | 7 | 10 | | 18 |
| 34 | 19990711 | | | | | 2 | 2 | | 4 |
| 35 | 19990711 | | | | | 6 | | | 6 |
| 36 | 19990712 | | | | 1 | 3 | 2 | | 6 |
| 37 | 19990712 | | | | | 10 | | | 10 |
| 38 | 19990712 | | | | | 12 | | | 12 |
| 39 | 19990714 | | | | 1 | 10 | 3 | | 14 |
| 40 | 19990714 | | | | | 4 | | | 4 |
| 41 | 19990714 | | | | | 7 | | | 7 |
| 42 | 19990717 | 1 | | | | 11 | | | 12 |
| 43 | 19990717 | | | | | 6 | | | 6 |
| 44 | 19990717 | 1 | | | 1 | 12 | | | 14 |
| 45 | 19990718 | | | | | 14 | | | 14 |

| Nr. | Dato | Tosk | Hýsa | Upsi | Kalvi | Havtaska | Skøta | Hvasskvoysa | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 46 | 19990718 | | | | | 18 | | | 18 |
| 47 | 19990718 | | | | | 20 | | | 20 |
| 48 | 19990719 | | | | | 9 | | | 9 |
| 49 | 19990721 | | | | 1 | 11 | | | 12 |
| 50 | 19990721 | | | | | 6 | | | 6 |
| 51 | 19990721 | 1 | | | 1 | 12 | 1 | | 15 |
| 52 | 19990725 | | | | | 18 | | | 18 |
| 53 | 19990725 | | | | | 20 | | | 20 |
| 54 | 19990725 | | | | | 14 | | | 14 |
| 55 | 19990725 | | | | | 9 | | | 9 |
| 56 | 19990725 | | | | | 2 | 1 | | 3 |
| 57 | 19990726 | | | | | 4 | | | 4 |
| 58 | 19990726 | | | | | 7 | | | 7 |
| 59 | 19990726 | | | | | 4 | | | 4 |
| 60 | 19990727 | | | | | 4 | | | 4 |
| 61 | 19990727 | | | | | 10 | | | 10 |
| 62 | 19990727 | | | | | 12 | | | 12 |
| 63 | 19990728 | | | | | 4 | | | 4 |
| 64 | 19990728 | | | | 1 | 11 | | | 12 |
| 65 | 19990728 | 1 | | | | 6 | 1 | | 8 |
| 66 | 19990805 | | | | | 12 | 1 | | 13 |
| 67 | 19990805 | 3 | | | 2 | 19 | | | 24 |
| 68 | 19990805 | | | | | 11 | | | 11 |
| 69 | 19990806 | 1 | | | | 4 | 2 | | 7 |
| 70 | 19990806 | | | | | 11 | | | 11 |
| 71 | 19990806 | | | | | 11 | | | 11 |
| 72 | 19990806 | | | | | 8 | | | 8 |
| 73 | 19990807 | | | | | 10 | | | 10 |
| 74 | 19990807 | | | | | 7 | | | 7 |
| 75 | 19990807 | | | | | 5 | 5 | | 10 |
| 76 | 19990807 | 1 | | | | 9 | 5 | | 15 |
| 77 | 19990808 | | | | | 7 | 4 | | 11 |
| 78 | 19990808 | | | | 1 | 10 | | | 11 |
| 79 | 19990809 | 1 | | | | 13 | | | 14 |
| 80 | 19990809 | 1 | | | 1 | 19 | | | 21 |
| 81 | 19990809 | | | | | 4 | | | 4 |
| 82 | 19990810 | | | | | 0 | | | 0 |
| 83 | 19990810 | | | | | 6 | | | 6 |
| 84 | 19990813 | | | | | 13 | 1 | | 14 |
| 85 | 19990813 | 1 | | | 2 | 22 | | | 25 |
| 86 | 19990813 | 1 | | | | 8 | | | 9 |
| 87 | 19990814 | | | | | 6 | 1 | | 7 |
| 88 | 19990814 | | | | | 15 | 1 | | 16 |
| 89 | 19990814 | | | | | 12 | 3 | | 15 |
| 90 | 19990814 | | | | 1 | 10 | | | 12 |
| 91 | 19990815 | 1 | | | | 6 | | | 7 |
| 92 | 19990815 | 1 | | | | 7 | | | 8 |
| 93 | 19990816 | 1 | | | | 8 | | | 9 |
| 94 | 19990816 | | | | | 14 | | | 14 |
| 95 | 19990816 | | | | | 12 | | | 13 |
| 96 | 19990817 | | | | | 16 | | | 16 |

| Nr. | Dato | Tosk | Hýsa | Upsi | Kalvi | Havtaska | Skøta | Hvasskvoysa | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 97 | 19990817 | 1 | | | 1 | 16 | 1 | | 19 |
| 98 | 19990817 | | | | | 10 | | | 10 |
| 99 | 19990818 | | | | | 8 | | | 8 |
| 100 | 19990818 | | | | | 6 | 1 | | 7 |
| 101 | 19990821 | | | | 1 | 18 | 3 | | 22 |
| 102 | 19990821 | 1 | | 4 | | 7 | 1 | | 13 |
| 103 | 19990822 | | | | | 9 | | | 9 |
| 104 | 19990822 | | | | | 13 | | | 13 |
| 105 | 19990822 | 1 | | | | 13 | 2 | | 16 |
| 106 | 19990823 | | | | | 27 | | | 27 |
| 107 | 19990823 | | | | | 17 | | | 17 |
| 108 | 19990823 | 1 | | | | 14 | 6 | | 21 |
| 109 | 19990823 | | | | | 11 | 3 | | 14 |
| 110 | 19990824 | | | | | 14 | | | 14 |
| 111 | 19990824 | | | | 1 | 18 | 3 | | 22 |
| 112 | 19990825 | 1 | | 4 | | 7 | 1 | | 13 |
| 113 | 19990825 | | | | | 9 | | | 9 |
| 114 | 19990825 | 1 | | | 1 | 9 | | | 11 |
| 115 | 19990828 | | | | | 17 | 2 | | 19 |
| 116 | 19990828 | | | | | 26 | | | 26 |
| 117 | 19990828 | | | | 1 | 15 | | | 16 |
| 118 | 19990828 | 1 | | | | 24 | | | 25 |
| 119 | 19990829 | | | | | 20 | | | 20 |
| 120 | 19990829 | 1 | | | | 16 | 5 | | 22 |
| 121 | 19990829 | | | | 1 | 16 | | | 17 |
| 122 | 19990830 | | | | | 21 | | | 21 |
| 123 | 19990830 | | | | | 34 | | | 34 |
| 124 | 19990831 | 1 | | | | 15 | | | 16 |
| 125 | 19990831 | | | | | 18 | | | 18 |
| 126 | 19990831 | 1 | | | 1 | 15 | | | 17 |
| 127 | 19990831 | 1 | | | | 8 | 4 | | 13 |
| 128 | 19990901 | | | | | 24 | | | 24 |
| 129 | 19990901 | | | | 1 | 12 | | | 13 |
| 130 | 19990901 | | | | | 10 | | | 10 |
| 131 | 19990904 | | | | | 21 | | | 21 |
| 132 | 19990904 | | | | | 34 | | | 34 |
| 133 | 19990904 | 1 | | | | 15 | | | 16 |
| 134 | 19990904 | | | | | 18 | | | 18 |
| 135 | 19990905 | 1 | | | 1 | 15 | | | 17 |
| 136 | 19990905 | | | | | 30 | | | 30 |
| 137 | 19990905 | | | | | 18 | | | 18 |
| 138 | 19990905 | 1 | | | 1 | 15 | | | 17 |
| 139 | 19990905 | | | | | 30 | | | 30 |
| 140 | 19990905 | | | | 2 | 16 | | | 18 |
| 141 | 19990906 | | | | | 21 | | | 21 |
| 142 | 19990906 | 1 | | | | 16 | 3 | | 20 |
| 143 | 19990906 | | | | 1 | 16 | 1 | | 18 |
| 144 | 19990907 | | | | | 16 | | | 16 |
| 145 | 19990907 | | | | 1 | 22 | | | 23 |
| 146 | 19990907 | 1 | | | 1 | 10 | | | 12 |
| 147 | 19990908 | 1 | | | 1 | 10 | | | 12 |

| Nr. | Dato | Tosk | Hýsa | Upsi | Kalvi | Havtaska | Skøta | Hvasskvoysa | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 148 | 19990908 | | | | | 13 | | | 13 |
| 149 | 19990911 | 1 | | | 1 | 17 | | | 19 |
| 150 | 19990912 | | | | | 15 | | | 15 |
| 151 | 19990912 | | | | | 15 | | | 15 |
| 152 | 19990912 | | | | | 12 | 1 | | 13 |
| 153 | 19990912 | 1 | | | 1 | 31 | | | 33 |
| 154 | 19990912 | 1 | | | | 25 | | | 26 |
| **Tilsamans kassar** | | **58** | **0** | **9** | **43** | **1810** | **164** | **2** | **2094** |
| **Tilsamans kg.** | | **3480** | **0** | **540** | **2580** | **108600** | **9840** | **120** | **125640** |

**FYLGISKJAL til spurning 2 í § 52a-fyrispurningi nr 17/2013: Veiða í royndum við ymiskum húkastøddum eftir skøtu á Føroya Banka í 2013.**

| Veida 10-12 januar 2013<br>Suður/vestari kantur | | |
|---|---|---|
| | | kg |
| Toskur | 1 | 846 |
| Toskur | 1 | 774 |
| Toskur | 1 | 791 |
| Toskur | 1 | 778 |
| Toskur | 1 | 135 |
| Toskur | 2 | 665 |
| Tilsamans toskur: | | 3989 |
| Hýsa | | 1132 |
| Upsi | | 77 |
| Brosma | | 20 |
| Longa | 1 | 900 |
| Longa | 2 | 1734 |
| Longa | 3 | 121 |
| Longa | 4 | 3 |
| Tilsamans longa: | | 2758 |
| Havtaska | | 78 |
| Skøta | | 2554 |
| Kalvi | 1 | |
| Kalvi | 2 | |
| Kalvi | 3 | |
| Tilsamans kalvi: | | 0 |
| Tilsamans | | 10608 |

| Veiða 30. mai til 1. juni 2013<br>Suður/vestari kantur og eitt legg í norðara kant | | |
|---|---|---|
| | | kg |
| Toskur | 1 | 1428 |
| Toskur | 2 | 22 |
| Tilsamans toskur: | | 1450 |
| Hýsa | 1-2 | 329 |
| Upsi | | 68 |
| Brosma | | |
| Longa | 1 | 654 |
| Longa | 2 | 2690 |
| Longa | 3 | 271 |
| Longa | 4 | 14 |
| Tilsamans longa: | | 3629 |
| Havtaska | | 15 |
| Skøta | | 1592 |
| Kalvi | 1 | 321 |
| Kalvi | 2 | 289 |
| Kalvi | 3 | 55 |
| Tilsamans kalvi: | | 665 |
| Tilsamans | | 7748 |

| Veiða 19-12 juli 2013<br>Landsynnings kanturin | | |
|---|---|---|
| | | kg |
| Toskur | 1 | 1384 |
| Toskur | 2 | 272 |
| Tilsamans toskur: | | 1656 |
| Hýsa | 1-2 | 35 |
| Upsi | | 15 |
| Brosma | | |
| Longa | 1 | 1155 |
| Longa | 2 | 3081 |
| Longa | 3 | 146 |
| Longa | 4 | 7 |
| Tilsamans longa: | | 4389 |
| Havtaska | | 12 |
| Skøta | | 2334 |
| Kalvi | 1 | 629 |
| Kalvi | 2 | 241 |
| Kalvi | 3 | 52 |
| Tilsamans kalvi: | | 922 |
| Tilsamans | | 9363 |

| Veiða 4-7 september 2013<br>Norðari kantur | | |
|---|---|---|
| | | kg |
| Toskur | 1 | 1343 |
| Tilsamans toskur: | | 1343 |
| Hýsa | 1-2 | 38 |
| Upsi | | 0 |
| Brosma | | |
| Longa | 1 | 1959 |
| Longa | 2 | 2878 |
| Longa | 3 | 106 |
| Longa | 4 | 0 |
| Tilsamans longa: | | 4943 |
| Havtaska | | 15 |
| Skøta | | 2991 |
| Kalvi | 1 | 358 |
| Kalvi | 2 | 184 |
| Kalvi | 3 | 17 |
| Tilsamans kalvi: | | 559 |
| Tilsamans | | 9889 |